## UTTAN ÚR HEIMI

# Neyðtøkur skaka amerikanska herin

**112 kvinnur, sum gera tænastu í amerikanska herinum í Afghanistan og Irak, hava meldað hermenn fyri neyðtøku**

NEYÐTØKUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Neyðtøkur og kynsligur ágangur ímóti kvinnum í amerikonsku verjuni eru vorðin ein so stórur trupulleiki, at í vikuni hevði Kongressin eina hoyring um evnið.

Har fingu tríggir generalar og ein admiralur greitt at vita, at megna teir ikki at verja kvinnurnar, fara politikararnir at leggja uppí. Republikanski senatorurin Susan Collins segði undir hoyringini, at eitt og hvørt kríggj hevur sínar avleiðingar og sín prís, men hesi eiga at koma av stríði við fíggindan og ikki av harðskapi frá sínum egnu.

Seinastu átjan mánaðarnar hava 86 kvinnur, sum starvast hjá amerikanska herinum í Afghanistan og Irak, meldað hermenn fyri neyðtøku. Tað sama hava 12 kvinnur í herflotanum, átta í flogvápninum og seks í herflotadeildunum gjørt.

Tær neyðtiknu kvinnurnar siga, at tær verða alt ov illa vardar ímóti ágangandi hermonnum, og harafturat vísir tað seg, at teir flestu neyðtøkumenninir sleppa undan rættarsókn, siga tær. Hetta stríðir greitt ímóti vanligari amerikanskari rættaruppfatan, har neyðtøka verður mett sum eitt sera álvarssamt lógarbrot, skrivar AP.

Tær neyðtiknu kvinnurnar siga eisini, at ofta eru tað tær, sum verða revsaðar, og at tær í flestu førum noyðast at halda fram at arbeiða saman við monnunum, sum hava neyðtikið tær.



*Masoumeh Bakhtiari og tær báðar døturnar, átta ára gamla Nazarim og tólv ára gamla Negar*

# Hon kann verða steinað til deyða

**28 ára gamla iranska kvinnan Masoumeh Bakhtiari kann vænta at verða revsað fyri at hava verið manninum ótrúgv, fer hon aftur til Iran. Enn er hon í Noregi, men myndugleikarnir har ætla at senda hana heimaftur**

REVSING

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Eg biði ikki um pengar. Eg biði bara um eina fáa ein møguleika fyri meg og døtur mínar, sigur Masoumeh Bakhtiati við Bergens Tidende.

Í 1999 tók hon døturnar við sær og flýddi frá manninum, sum var rúsevnismisnýtari. Tey bæði vóru systkinabørn, og familjan noyddi hana at gifta seg við honum. Sjálv var hon bara 15 ár tá.

Hjúnarlagið gjørdist ein sonn marra og var merkt av harðskapi. Maðurin seldi rúsevni og var harafturat misnýtari sjálvur. Einaferð kom Masoumeh at kenna ein annan mann, sum henni dámdi væl, og maður hennara legði hana alt fyri eitt undir at hava verið sær ótrúgv.

– Hann royndi fleiri ferðir at taka lívið av mær, sigur tann 28 ára gamla kvinnan, sum enn tann dag í dag hevur arr eftir harðskapin.

Hon gjørdi av at flýggja úr Iran og fór fyrst til Danmarkar. Hon søkti um uppihaldsloyvi, men tá hon ikki hevði fingið svar trý ár seinni, fór hon til Noregs saman við døtrunum, sum eru tólv og níggju ára gamlar. Seinastu tíðina hevur nú búð saman við einum landsmanni, sum flýddi úr Iran longu sum 13 ára gamal, og sum í dag er danskur ríkisborgari.

### Lýkur ikki treytirnar

Norsku myndugleikarnir halda ikki, at Masoumeh Bakhtiari lýkur treytirnar fyri at fáa uppihaldsloyvi í Noregi.

– Hon hevur ongantíð verið politiskt virkin. Trupulleikin er harðskapur og hóttanir hjá manninum, vandin fyri at missa døturnar, og at hon kann verða revsað fyri at hava tikið døturnar við sær úr Iran og fyri at hava verið manni sínum ótrúgv, skrivar norska útlendinganevndin. Niðurstøðan hjá nevndini er, at tann iranska kvinnan lýkur ikki treytirnar fyri at fáa uppihaldsloyvi.

Masoumeh og maðurin, sum hon nú býr saman við, vilja sleppa at gifta seg, men so leingi hon ikki hevur uppihaldsloyvi í Noregi, kann hon ikki giftast. Tey kunnu giftast aðrastaðni, men tað er trupult.

– Tey flestu londini hava somu reglur sum her í Noregi. Hevur tú ikki uppihaldsloyvi, sleppur tú ikki at gifta teg, arbeiðaraflokspolitikarin Tor Bremer við Bergens Tidende. Hann hevur verið virkin í málinum hjá teirri iransku kvinnuni og døtrum hennara.

– Tað er neyðugt at gera vart við seg í einum so syrgiligum máli sum hesum. Tað, sum er hent í hesum málinum, er í mínum eygum so órættvíst, at tað kann ikki standa óátalað, sigur Tor Bremer.

Hann vísir á, at Amnesty International hevur skjalprógvað fleiri dømi um, at bæði menn og kvinnur eru vorðin steinað til deyða í Iran í seinastuni, tí tey hava verið hjúnarfelaganum ótrúgv. At teir konservativu vunnu tjóðartingsvalið, og at nýskipanarhugaðir politikarar ikki sluppu at stilla upp heldur norski politikarin vera tekin um, at tað er burturvið at senda fólk hagar, sum kunnu vænta sær deyðarevsing.

### Eingi rættindi

Tá Masoumeh flýddi, fekk maður hennara hjúnarskilnað játtaðan. Kortini hevur hann seinni hótt við at gera seg inn á hana.

– Tað fyrsta, sum hendir, um eg fari aftur til Iran, er, at døturnar verða tiknar frá mær. Síðani fer fyrrverandi maður mín at melda meg til myndugleikarnar, og í Iran verða ótrúgvar kvinnur revsaðar við steining, sigur Masoumeh Bakhtiari.

Í tí konservativa muslimska landinum eru serligar reglur galdandi í sambandi við steining. Tá ein kvinna skal steinast til deyða, verður hon grivin niður í jørðina, so bringan er omanfyri. Steinarnir, sum verða tveittir eftir henni, skulu vera so mikið stórir, at teir kunnu drepa hana.

– Kvinnur hava eingi rættindi. Menninir ráða øllum. Og tær moralsku lógirnar ru strangar. Tey siga, at eg kann fara heimaftur, tí eg eri skild. Men tey mistaka seg. Tey, sum siga slíkt, kenna ikki Iran, sigur Masoumeh.

Hon dylir ikki fyri, at hon er vónsvikin.

– Allir okkara grannar trúgva okkum, men ikki teir norsku myndugleikarnir. Teir áttu í minsta lagi at hugsa um døtur mínar, sigur hon við Bergens Tidende.

# Hans Blix varð eisini avlurtaður



*Hans Blix. Eisini hansara fartelefon bleiv avlurtað undan krígnum í Irak*

**Tað var ikki bara telefonin hjá Kofi Annan, sum bleiv avlurtað upp undir kríggið í Irak. Tað sama var við telefonini hjá vápnaeftirlitsmanninum Hans Blix**

AVLURTING

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrrverandi bretski ráðharrin Clare Short vil vera við, at bretar og amerikanarar avlurtaðu telefonina hjá ST-aðalskrivaranum, Kofi Annan, upp undir kríggið í Irak. Tony Blair vil hvørki vátta ella avsanna tíðindini.

Nú vilja fleiri avstralskir fjølmiðlar vera við, at telefonin hjá Hans Blix varð eisini avlurtað. Tann 75 ára gamli sviin stóð á odda fyri vápnaserfrøðingunum, sum leitaðu eftir hópoyðingarvápnum í Irak.

Útvarpsstøðin ABC segði í gjár frá keldum í avstralsku fregnartænastuni, at tað var serliga fartelefonin hjá Hans Blix, sum hevði áhuga, og at áhugin fyri henni var serliga stórur, hvørja ferð Hans Blix kom til Irak. Upplýsingarnar vórðu sendar USA, Bretlandi, Avstralia, Ný Sælandi og Kanada, siga keldurnar sambært ABC.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Lisbeth L. Petersen 65 ár



Í dag, leygardagin 28. februar, fyllir Lisbeth L. Petersen í Havn 65 ár.

Lisbeth er fødd og uppvaksin í Havn. Foreldrini vóru Rachel, f. Fonsdal, ættað úr Vestmanna, og Georg Lindenskov Samuelsen, ættaður úr Fuglafirði.

Hon tók realprógv í 1955 og studentsprógv á Bagsværd Kostskole og Gymnasium í 1958.

Hon hevur arbeitt sum projektskrivari á Føroya Fornminnissavni.

Hon hevur sitið á Løgtingi síðan 1990 og var formaður í tingbólki Sambandsfloksins frá 2001-2004. Eftir valið 20. januar 2004 bleiv hon limur í fíggjarnevndini og trivnaðarnevndini.

Lisbeth var starvsstjórnarlimur í Sambandsflokkinum frá 1980-90 og floksskrivari frá 1982-87, nevndarlimur í "Føroya Væl" - valfelag Sambandsfloksins – frá 1989-2000, og sum formaður frá 1997-99.

Hon var varalimur á Fólkatingi frá á heysti 1988, til hon bleiv vald í Fólkatingi í 2001. Hon bleiv kosin Riddari av Dannebrog í 1995.

Hon sat í Tórshavnar Býráð frá 1984- 2000 og sum býráðsformaður frá 1992-96.

Eisini var hon næstformaður í Kvinnufelagssamskipan Føroya frá 1982-86.

Lisbeth var gift við Jákup Petersen, maskinmeistara, sum andaðist í 2001, 74 ára gamal. Jákup var sonur Elsu og Jóannes Petersen av Signabø.

Børnini hjá teimum eru: Elsa, f. 1961, og Georg, f. 1967, ommubørnini hjá Lisbeth eru fimm í tali.

### Hans Eli Dahl 60 ár



Í dag, 28. februar, fyllir Hans Eli Dahl í Havn, 60 ár.

Hans Eli er havnarmaður, sonur Edith, f. Jacobsen, úr Vestmanna, og Paula Dahl úr Havn. Hann er giftur við Birnu, f. Jensen, úr Froðba.

Hann tók lærarapróg á Føroya Læraraskúla í 1967 og var lærari í Sørvági frá 1967-71, og í Tórshavnar Kommunuskúla skúlaárið 1971-72.

Umframt sína læraraútbúgving hevur hann útbúgving sum tali- og hoyrilærari.

Í 1984 varð hann settur sum lesiráðgevi á Landsskúlafyrisitingini, og eftir at ráðgevingin í 1991 flutti á Skúlan á Trøðni, varð starvið umskipað til pedagogiskan ráðgeva. Frá 1. februar 2001 var hann fyribilsstjóri á Sernámsdeplinum til hann 1. august 2003 bleiv settur sum stjóri á Sernámsdeplinum.

Føroya Fiskavirking:

# Hans Joensen 25 ár í sama starvi



Herfyri hevði Hans Joensen í Havn arbeitt 25 ár á sama arbeiðsplássi – Bacalao og Føroya Fiskavirking.

Hans er skopuningur, sonur Gullborg, f. Olsen og Kristian Joensen, bæði úr Skopun.

Tá Hans var 13 ára gamal, flutti familjan til Havnar at búgva.

Hann róði út í Grønlandi frá 1967-69 og sigldi við "Baki" hjá Skipafelagnum Føroyar frá 1970-75.

Eftir tað var hann útróðrarmaður í eini trý ár, til hann fekk fast starv á Bacalao í 1978.

Hansara uppgáva er at frysta slógv, sum verður útflutt sum minkafóður.

Hans hevur trivist væl á arbeiðsplássinium - bæði hjá Bacalao og hjá Føroya Fiskavirking. Hann arbeiddi eisini nógv á Bacalao sum ungur, hann var bert 14 ára gamal, tá hann fyrstu ferð arbeiddi har.

Seinasta árið er Hans best kendur sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag. Hann hevur verið nevndalimur í felagnum í eini seks ár, og 1. februar 2003 bleiv hann valdur til formann.

Í fríløtunum um summarið dámar honum best at fiska laks á Leynavatni. Uttanfyri laksasesongina møtast nakrir av teimum sum fiska laks, einaferð um vikuna, í húsunum hjá Føroya Sílaveiðufelag í Havnardali, har teir spæla kort.

Hans er giftur við Kirstin, f. Eysturtún, úr Havn, tey eiga tríggjar døtur: Joan og Judith, sum búgva í Havn, og Harriet sum býr í Vestmanna.

# Noomi Solmunde 80 ár

## 29. februar 2004



Allarbesta omma!

Á henda hátt vil eg ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum, sum verður í morgin.

Tað at verða føddur 29. februar er nakað heilt serligt, tí hesin dagurin er jú bert fjórða hvørt ár. Men at tað er tú góða omma, sum bleiv fødd 29. februar 1924, tað passar so væl til dagin, tí tú ert nakað heilt serligt.

Ikki finst ein betur og fittari omma í allari verðini, tað er heilt sikkurt. Um øll høvdu eina so góða og fitta ommu, sum vit eiga, so hevði alt verið nógv betri.

Tað er altíð so gott at koma inn á gólvið hjá tær og abba, altíð so blíð og altíð klár við einum góðum drekkamunni. Man følir seg so vælkomnan og elskaðan. Tað hevur nógv at siga fyri okkum øll, at tú ert so góð við okkum, og tú ert so áhuga í hvat vit gera, hvussu vit hava tað o.s.v.

Omma, tú hevur so nógvar góðar eginleikar, ið vit fáa so stóra gleði av, men eg dugi illa at seta orð á. Men tað besta, sum er, tað er at vita at tú eigur Jesus í tínum hjarta og at tú og abbi hvønn tann einasta dag biðja fyri okkum øllum og leggja okkum øll í Hansara hendur. Tað er so gott at vita, og tað merkist eisini.

Tá onkur av okkum er sjúkur ella skal upp til próvtøku ella okkurt annað, so ringja vit altíð til ommu og biðja hana biðja fyri okkum, tí tá vita vit, at tað verður gjørt og ikki gloymt. Og sanniliga hava vit eisini merkt at tað hjálpir.

Eg vil siga tær takk omma, fyri at tú og abbi vóru einslags "mamma og pápi" fyri meg og míni, tá mamma og babba búðu í Danmark. Tá eg saknaði mammu og babba, so var eg skjót bara at koma út til tykkum, og tað hjálpti. 1000 takk skal tú hava fyri tað, tað hevði nógv at siga fyri meg.

At enda omma vil eg ynskja tær (og abba) alt tað besta í framtíðini og Jesuspápi er hjá tær og tykkum ALTÍÐ…

Eg elski teg.

Bestu heilsanir frá

**elstu ommudóttrini**